Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 23. november 2017 við 2. viðgerð samtykt fíggjarætlanina fyri kommununa fyri 2018.

Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 140.271.600,00.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar til brutto kr. 78.989.600,00 og netto til kr. 55.366.500,00.

Íløgurnar verður mettar brutto til kr. 51.482.000,00 og netto til kr. 47.882.000,00.

Rentuútreiðslurnar verða mettar til kr. 3.300.000,00, meðan avdráttirnir av lánum verða mettir til kr. 6.500.000,00.

Inntørnar verða mettar til:

| | |
|---|---|
| A+B skattur | kr. 59.933.323,00 |
| Partafelagsskatturr | kr. 12.000.000,00 |
| Skattur av kapitaleftirlønum | kr. 10.713.000,00 |
| Skattur av DID og FAS | kr. 2.782.000,00 |
| Nýtsla av innistandandi | kr. 10.905.277,00 |
| Rakstrarinntøkur | kr. 23.623.000,00 |
| Rakstrarinntøkur av íløgum | kr. 3.600.000,00 |
| Mett lántøka | kr. 16.700.000,00 |
| Húsaleiguskattur | kr. 15.000,00 |

Tilsamans kr. 140.271.600,00

Størsta útreiðslan í rakstri er kommununar partur av rakstri av eldrasamstarvinum Nánd við kr. 17,0 mió undir øki 2 «Almanna- og heilsumálum».

Íløgurnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Økið 1 Kommunal fyrisiting | kr. 425.000,00 |
| Økið 3 Børn og ung | kr. 230.000,00 |
| Økið 4 Undirvísing | kr. 26.400.000,00 |
| Økið 5 Mentan og frítíð | kr. 12.800.000,00 |
| Økið 6 Teknisk mál | kr. 7.980.000,00 |
| Økið 7 Kommunal virki | kr. 3.647.000,00 |

Íløgurnar verða í høvuðsheitum hesar: Á øki 1 eru avsettar kr. 425.000,00 til inniklimaanlegg á býráðsskivstovuni, á øki 3 eru avsettar kr. 230.000,00 sum íløga í ansingarstovnin Kamb.

Á øki 4, eru avsettar kr. 26,2 mió til bygging av nýggjum barnaskúla. Á øki 5 eru avsetar kr. 12,3 mió til ítróttarøkið, t.v.s. bygging av nýggjum ítróttarhúsi og nýggjum ljósmastrum til leikvøllin. Somuleiðis eru avsettar kr. 500.000,00 sum íløga í uppstiðan av Mentanarhúsinum. Á øki 6 eru avsettar kr. 5,0 mió til byggibúning í Fuglafirði og kr. 700.000,00 til byggibúning av sethúsaøki á Kambsdali.

Á øki 7 eru avsettar kr. 3.65 mió til íløgur í Fuglafjarðar havn.

Annars verður víst til heimasíðu kommununar www.fuglafjordur.fo, har gerðabókin hjá býráðnum um viðgerðina av fíggjarætlanini 2018 er til skjals.

Fuglafjarðar kommuna